

*Arbeiðið at byggja nýggjan bygning á Hálsi til Elding er byrjað. Bygningurin er 5000 fermetrar*
*(Mynd:Bárður Lydersen)*

# Elding og El-Giganten nýggjan bygning á Hálsi

**Elding byggir nú stóran bygning á Hálsi í Havn. Í bygninginum verður handilsvirksemið hjá Elding, Køksmiðstøðini og rúmari ræsur verða nú eisini fyri samstarvinum við stóru handilsketuna El-Giganten**

ELDING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Elding byggir nú stóran bygning á Hálsi í Havn. Hesin er millum bakaríið hjá Gunnleivi og Veðurstøðina. Umframt vanliga handilsvirksemið hjá Elding verður betri pláss fyri HTH Køksmiðstøðini og samstarvinum við stóru handilsketuna El-Giganten.

Elding hevur longu samstarv við El-Giganten, sum er størsta fyritøka av sínum slag í Norðurlondum.

– Samstarvið við El-Giganten hevur sjálvandi fyrimunir við sær fyri okkum við viðvíkjandi innkeypi og harvið eru eisini fyrimunir fyri kundan. Við nýggja bygninginum fáa vit góðar umstøður fyri øllum pørtum av virkseminum, bæði Elding, Køksmiðstøðini og samstarvinum El-Giganten, sigur Mads Andreas Winther, stjóri í Elding.

## Stórur bygningur

Nýggi bygningurin hjá Elding á Hálsi verður 5000 fermetrar, Men ætlanin hjá Elding er tó ikki at nýta alt fermetratalið, men talan kann gerast um at leiga ein part av hølunum út til annað virksemi.

– Tað snýr seg fyrst og fremst um at nøkta tørvin hjá Elding og samstarvinum við El-Giganten og hjá Køksmiðstøðini, sigur Mads Andreas Winther.

Hann væntar, at Elding flytir úr SMS í februar komandi ár og niðan í nýggju hølini á Hálsi, ið tá ætlandi eru liðug, so Elding og tað virksemi, ið fyritøkan nú fevnir um, kann húsast í nýggju hølunum.



*Nýggju og stásiligu hølini á Hálsi, har Elding, El-Giganten og Køksmiðstøðin fara at húsast*

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Fríggjakvøldið
opið til kl. 21.00

Nógv spennandi tiltøk vera uttan fyri handlarnar!
Byrjar kl. 18.00

Nógv góð festivaltilboð

Joan & Jórun
TATOOVERA
frá 50,-

Nanna
FLÆTTAR
1. flætta 40,-

Vera og Sunnuva
HOL Í OYRUNI
50,- pr. stk.

KAFFI

"OKKARA SHAKY" & JÓGVAN
FRA DYNAMIT
spæla og syngja kl. 19.00

CHEAP
Lunell
Maskulin
Eilif Arge
BLITZ
Foto og gávulutir

cre8 458006